## Ellisheim er søtur tónleikur

- Tað ljóðar, sum søtur tónleikur í mínum oyrum, sigur Daisy Sloan, sum millum annað var ein av fyriskiparunum til borgarafundin um tey eldru í miðstaðarøkinum.
Hon greiðir tó somuleiðis, frá, at hon ikki kann siga við vissu, hvussu góður bygningurin er, men hon heldur at húsið liggur væl fyri. - Hóast tað er eitt slag av ídnaðarøki, so er tað ein hugnalig atmosfera rundan um húsið, og fólk hava møguleika at fara útum, metir hon. Hon gleðist somuleiðis, at okkurt , eftir øllum at døma, nú er um at henda.



## Fótklinikk í Fuglafirði

Nýggj Fótklinikk er latin upp í Rossagerði 17 í Fuglafirði. Tað er Brynhild Hansen sum eftir lokna útbúgving frá Fótterapeutskúlanum í Randers sum statsgóðkendur fótterapeutur er heimafturkomin og hevur bygt sær eina fótklinikk sum er nútímans útgjørd. Hugsað hevur eisini verið um tey rørslutarnaðu, tí tað er væl atkomuligt og rúmligt er eisini inni.



*Eftir øllum at døma verður hesin bygningurin á Hálsi næsta búplássið fyri eldri í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Havnin fær ellisheim á Hálsi

**Líkt er til, at nýggjasta ellisheimið í Tórshavnar kommunu um stutta tíð verður á Hálsi. Talan er um bygning hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, sum Tórshavnar kommuna arbeiðir við at gera til eitt ellisheim**

ELDRAØKI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, ikki vildi fyri kortum ikki vátta tíðindini, men nú greiðir hann frá, at ein stórur møguleiki er fyri, at bráfeingisloysnin, sum Tórshavnar kommuna skuldi finna til eldraøkið, hevur okkurt við bygningin hjá brunatryggingini á Hálsi at gera.

Heðin Mortensen greiðir somuleiðis frá, at tað skal vera ein skjót loysn, sum skal útvega 70-75 búpláss til eldri fólk, og at um henda ætlan verður veruleiki, so kemur hon at kosta millum 50-80 milliónir krónur, tá fólkini flyta inn.

### Stórar umbyggingar

Hóast tað liggur í kortunum, at Tórshavnar kommuna fer at keypa bygningin hjá Brunatryggingini á Hálsi til búpláss til eldri, so dugir Heðin Mortensen at síggja, at stórar umbyggingar skulu gerast, áðrenn bygningurin kann takast í nýtslu.

- Tað, sum vit mugu gera okkum greitt, er um tað loysir seg betri at umbyggja bygningar, sum vit kunnu keypa, ella um tað loysir seg betri at fara í gongd beinanvegin at gera eitt nýtt røktarheim, sigur borgarstjórin.

Hinvegin er tað eisini soleiðis, at bygningar skulu fylgja nøkrum treytum, áðrenn fólk skulu flyta inn.

- Krøvini til búpláss til eldri eru so ómetaliga stór, og vit bíða eftir, um tað er nakar møguleiki fyri at fáa hendan bygningin góðkendan, greiðir Heðin Mortensen frá.

### Gott øki

Økið, har nýggjasta heimið helst verður, hevur ofta verið kallað eitt ídnaðarøki og ein rúgva av lagur- og handilsbygningum eru har.

- Eg haldi tað er eitt sera gott øki. Men tað veldst, hvørjum mann hevur tørv á. Tað eru til dømis tríggir minuttir at ganga oman í Hoydalar, um fólk eru nóg væl fyri til tað, sigur borgarstjórin, sum sjálvur ikki hevði havt nakað ímóti at nýtt ein part av sínum aldurdómi har.

Hann greiðir tó frá, at tað er ein spurningur um loyvir, hvussu langa tíð bygningurin tekur at gerast klárur, veldst

### Fleiri loysnir

Hóast Heðin Mortensen váttar, at bygningurin hjá Tryggingini á Hálsi er ein av møguleikunum kommunan arbeiðir við, so hevur kommunan, umframt ellisheimið yviri við Strond, fleiri aðrar møguleikar.

- Vit kunnu eisini keypa ein lidnan blokk, tað kann til dømis vera á Norðasta Hornið ella á Argjum millum skúlan og byggingina hjá Valbirni Dalsgarð. Og vit hava eisini øki á Karlamagnussarbreyt, sum eru púra klár at byggja á, sigur Heðin Mortensen.

# Bjarni Bjarnason nevndarbjørnin yvir øllum

**Í gjár gjørdist Bjarni Bjarnason nevndarformaður í Atlantsflogi. Hann er ongin ungi, tá talan er um nevndararbeiði, tí nevndarsessurin í Atlantsflogi er hansara fjórði í løtuni. Hinvegin dugir hann illa at meta, um nevndin fer at virka øðrvísi nú**

NEVNDARVAL
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hann er 42 ára gamal. Er stjóri í Vodafone í Føroyum, og hevur nevndarsessir í Farice, Norðoyatunlinum og Vágatunlinum, umframt nýggja nevndarformanssessin í Atlantsflogi.

Hann er havnarmaður, hevur útbúgving innan búskap úr Aarhus, og var tengdur at landsstýrinum áðrenn hann í 2000 gjørdist stjóri í felagnum, ið tá æt Kall.

Men um hansara egna leiklut í Atlantsflogi vil hann ikki siga ov nógv.

- Onnur mugu døma um, um tað hevði verið øðrvísi, um onkur annar var formaður, greiðir Bjarni Bjarnason frá.

Nevndarformaðurin er ikki nakað serliga tíðindafróður, tí felagið er børsnoterað. Og hann vil heldur ikki úttala seg nakað serligt um ósemjurnar, ið hava verið kring nevndina.

- Ósemjurnar hava ikki verið í arbeiðinum í felagnum, men kring felagið, og eg havi onga støðu til rumbulið, og eg havi heldur ikki nakra viðmerking til leiklutin hjá Landsstýrinum í felagnum, sigur Bjarni Bjarnason.

Hann leggur afturat, at hann hevði sagt meira, um tað var hansara egna felag.

### Útskiftingar í nevndini

Umframt Bjarna Bjarnason, sum er nýggjur í nevndini fyri Christian Andreasen, er Kaj Johannesen eisini nýggjur í nevndini. Hann avloysir Eyðfinn Jacobsen, sum takkaði fyri seg og klamsaði við hurðini.

Hini í nevndini eru framvegis tey somu. Petur J. Eiriksson, Jens Wittrup Willumsen umboða landið og Verna Rasmussen og Ingi S. Joensen eru starvsfólkaumboð.

Tá nevndarvalið var liðugt í gjár, var rættiliga kalt í Vágum, tí tøgn valdaði, tá nýggju nevndarlimirnir vórðu valdir. Hinvegin ljómaðu lógvabrestrinir fyri Christiani Andreasen, tá hann takkaði fyri seg.



*Nýggi nevndarformaðurin í Atlantsflogi er ikki serliga tíðindafróður, men greiðir frá, at tað hevði verið øðrvísi, um tað var hansara egna felag*